## Samband

**MANN**
36 ár, ønsker brevvenner, (Kjønn og alder uvigtig). Hobbys: Konst, sport, matlagning, psykologi.
Skriv til:
Francois Guémy
213 Rúe Breteuil
F-13006 Marseille

## Sjavs

**SJAVSKAPPING!**
Sjavskapping verður á Svangaskarði mánadagin 22.3 kl. 18.30.
Tofta Ítróttarfelag

**SJAVSKAPPING**
Sjavskapping verður í Stórhúshøll sunnudagin 21.3. kl. 16.00. Tekning óneyðug.
Ahugafelagið á Fløtugerði

**SJAVSKAPPING**
verður á Strondum sunnudagin 21. mars kl. 18. Leikarar millum 4 tey bestu pørini fáa steyp til ognar. Spælt verður um eina ferð fyri tvey til Glasgow við Atlantic Airways. Tilmelding ikki neyðug.
Strálan

**FM Í SJAVS**
Skipað verður fyri Føroyameistarakapping í sjavs í høllini í Runavík 10. apríl kl. 15.00.
NSÍ-B68

## Súkklur

**GENTUSÚKKLA YNSKIST**
Eg havi eina vælhildna damusúkklu, 26", 3 gear og ynskir at býta hana um við
eina gentusúkklu, 24" við fótbremsu.
Tlf. 319095

**TIL SØLU**
Ein súkkla, so gott sum nýggj, við 15 gearum, og eitt Puch prutl til sølu.
Tlf. 45 56 00

**MOTORSÚKKLA**
Motorsúkkla 180ccm til sølu fyri kr. 9.000.
Tlf. 373666

**YNSKIST**
Tvær góðar brúktar súkklur ynskjast til keyps. Onnur 12 ára aldur hin 16 ára aldur. Helst uttan gear.
Tlf. 700808

**TIL SØLU**
Puch Maxi K. í góðum standi til sølu.
Tlf. 371892

**TIL SØLU**
Ein 7 mðr. gomul Aprilia motorsúkkla til sølu.
Tlf. 372932/ 371932

**EIN SÚKKLA**
so gott sum nýggj, til sølu. Marathon, cx300, gul við 18 gearum.
Tlf. 320366

## Teldur

**GERIÐ KVETTI**
Til sølu ein pentium mmx 266 mhz. Hevur Win98 og Office97, pro lotus, Smartsuite og nógv góð spøl t.d. Flight simulator 98 og Fifa 99, Need for speed 3, doom 1 og doom 2, ein printari bjc 250 og eitt 33,6 modem. Til sølu fyri 8-10.000 kr
Tlf. 455866,
spyr eftir Heina

**TELDA TIL SØLU**
300 MHz, 64 mbRam, printari, nógv spøl og programmir, 5 mðr. gomul.
Tlf. 318115

**TELDA TIL SØLU**
P-200 MMX, 15" skerm v/ hátalara og mikrofon, 1.6 GB HDD, 64 Ram, 4 mb Matrox Mys. 220 skermkort, Modem 33,6, Netkort, cdrom. Til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 31 46 94 eftir kl. 17
E-mail: Ragnar@post.olivant.fo

**TELDUSPØL TIL SØLU**
M.A.X. roadwarrior, Shatterdsteel, Syndicate ward, Kickoff 98, Global Soccer 200 kr. stk.
Tlf. 315674

**TIL SØLU**
Telda, Windows 3.11, við printara, góð til skúlabrúk, til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 312688

**TIL SØLU**
Pentium 233 Mhz MMX - 4,3 GB Harddisk, 64 MB 5D RAM, 15" skerm, externt K56 flexmodem, ljóðkort, S3 Virge, DX Grafikkort, NE2000 netkort, 24x CDROM. 8000 kr.
Tlf. 315548

**TIL SØLU**
Printari HP LaserJet 5 I til sølu fyri 2.500 kr. Lítið brúktur.
Tlf. 317906

**TIL SØLU**
Pentium II 266 MHz, 6,4 GB Haridsk, 64SD-RAM, 15" skerm, 4 RAM 3D-kort, ljóðkort, netkort, modem 56K, 32xCD rom, til sølu fyri 9.000 kr. Eisini er eitt Voodoo II 12-ram til sølu við keyp av teldu fyri 900 kr.
Tlf. 448159

**TIL SØLU**
1 sjónvarpsborð hvítt, spøl til Comandor 64, spøl til Nintendo og 2 banduppstakarar til comandor 64.
Tlf. 361037

**TIL SØLU**
P 100 MzH 32Mb Ram, 850 Mb HD 4xCD-Rom, 15" skermur, ljóðkort SB 64, Modem 56.000 KBPS W95 við HP690 + litprintara. Prísur 6000 kr.
Tlf. 317407

**YNSKIST**
Crash bandicoot 2, til playstation, ynskist til keyps.
Tlf. 312605

**TIL SØLU**
P166mx við 32 mb ram 2.0 gb hd 2mb s3 skerm kort voodoo 2 kort við 12 mb ram ljóð kort 15"skerm joystik,printari og scannari w 95 office 97 til sølu fyri einans 4500 kr .spøl sum unreal, resident evil,test og test drive 5 fylgja eisini við.
Tlf. 281550

**TELDA BÍLIGA TIL SØLU**
PC-30III hevur rokniark og tekstviðgerð. Printari og telduborð fylgja við.
Tlf. 441216

**TIL SØLU**
Eitt Sega Game gear við einum spæli „Columns" til sølu fyri 250 kr.
Tlf. 310853

**TIL SØLU**
Org. spøl til Amiga. Grand Prix 100 kr., Premier Manager 2 150 kr., Flight of the Amazon Queen 200 kr.
Tlf. 310853

**TELDA TIL SØLU**
P-233-MMX, 17" skerm, 6.4 GB HDD, 64 SD RAM, Voodoo 3D 6 mb skermkort, modem 33,6, netkort 24xcdrom. Til sølu fyri 9.000 kr.
Tlf. 314694 eftir kl. 17
E-mail.Ragnar@post.olivant.fo

**TELDA OG PRINTARI**
bíliga til sølu. Pentium 100, 16 MB RAM, 32xCD-ROM, 1.7 GB Hardisk, 2D-30 grafikkort, ljóðkort, Window 95, 15" skerm+ hátalarar, Citizen printari, Prísur 8.000 kr.
Tlf. 319934

**TIL SØLU**
Playstation spøl: Jersey Devil 150 kr., Rayman 250 kr. Adidas Soller 250 kr., Fifa 97 300 kr., Herkules 300 kr. og Reality Glove 400 kr.
Tlf. 317139

**TIL SØLU**
Pentium II 266 MHz, 3,2 Gb Harddisk, 32 MB SD-RAM, 15" skerm, modem, ljóðkort og hátalarar. Nógv góð forrit og spøl fylgja við, til sølu fyri 8000 kr.
Tlf. 455786

## Tónleikur

**TIL SØLU**
Bilstereo av merkinum Pioneer v/ radio, band og fløguboks til sølu fyri ca. 6.000 kr.
Tlf. 42 12 51

**SÍ HER – GERIÐ KVETTI!**
Hava tygum tørv á fløguspælara? Biligur einstakur Kenwood fløguspælari til sølu fyri uml. 1500 kr. – uttan fjarstýring (ikki er sørt, at góðskan er góð).
Ringið á tlf. 316584

**BASS FORSTERKARI**
220 watt bass forsterkari til sølu fyri 3500 kr.
Tlf. 310177

## Út- & Sjónvarp

**TIL SØLU**
Tandberg Radio við tveimum hátalarum. Er sum nýtt.
Tlf. 318268 eftir kl. 18

## Ymiskt

**ROKKJALLARIN**
Vit átaka okkum at selja fyri fólk.
Eisini keypa vit deyðsbúgv.

ROKKJALLARIN
Tlf. 311990 & 283390
Tinghúsvegur 42 · 100 Tórshavn
Opið: mánad.-fríggjad. kl. 13–17.30
Leygardag: eftir avtalu

**TIL SØLU**
Nýtt vindeyga við ongum rúti, std. 160x120.
Tlf. 361085

**YNSKIST**
Er tað nakar sum eigur rulluskoytur XP 700 ella XP 750 str. 38-39 ella 40. at selja mær bíliga.
Ragnar, tlf. 31 46 99

**FARTELEFON TIL SØLU**
Nokia 232, NMT 900 til sølu fyri 1000 kr. Taska fylgir við.
Tlf. 31 46 94 eftir kl. 17

**MÁLNINGAR TIL SØLU**
Málningar av Waagstein til sølu um hoskandi boð fæst. M/b Juvel 91x66 cm. og Borjavík 98x79 cm.
Tlf. 098123657 ella e-mail: joanes.andreasen@teliamail.dk

**KEKKIA-FØROYAR**
Kom við 12. manni til Prag í oktober at stuðla fótbóltslandsliðnum. Ring og hoyr meira!
12. maður, tlf. 282212

**SÆLGES**
Løbebånd sælges, med elektronisk udlæsning, kr. 800.
Tlf. 42 11 41

**BLÍV LIMUR**
í Áhugafelagnum »12. maður« við at gjalda 100 kr. á postgiro 78212. Hjálp okkum at stuðla landsliðnum!
12. maður

**FIMLEIKA-FRAMSÝNINGAR**
Sýningarnar verða í høllini á Nabb hesar tíðir: Sýningin við yngru liðunum verður leygardagin 20.3 kl. 16.00 Sýningin við eldru liðunum verður týskvøldið 23.3 kl. 19.00.
Havnar Fimleikafelag

**TVØRFLOYTA**
Ein Yamaha tvørfloyta til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 313946

**TIL SØLU**
Ein 6 mðr. gomul Ericsson NH 238 mobiltelefon til sølu fyri 1500 kr.
Tlf. 075 212504 eftir kl. 16

**YNSKIST**
Hevur nakar eitt brúkt reiggjustativ at selja mær
Tlf. 316442

**TIL SØLU**
Telefax av slagnum Xerox til sølu.
Tlf. 315828

**GRUNDSTYKKI**
til sølu. Stykkið liggur Undir Klakki 12, 542 kvm. stórt.
Tlf. 456667 - 283236

**EFTIRLÝSING**
Ef tað onkur sum hevur eitt radio at selja mær frá árunum 1960-70.
Ring tlf. 319613

**PENNAR**
Pennar við reklamu á til sølu.
Tlf. 456868
Vit senda um alt landið.
Bygdarfelagið Báran

**FARTELEFON**
Erikson NH 238 (NMT 900) við vibrator til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 283459

**GÓLVMÁTTIR**
Vakrar og litfagrar gólvmáttir, ið kunnu vaskast og turkast til sølu. 3støddir.
Tlf. 211312 dag og 321211 kvøld.

**KEKKIA-FØROYAR**
Kom við 12. manni til Prag í oktober at stuðla fótbóltslandsliðnum. Ring og hoyr meira!
12. maður tlf. 282212

*Frá*
**Stokka-stovuni**
*í Runavík*

**Vit hava opið hvønn dag frá kl. 17–23.30, tó fríggjad. og leygard. frá kl. 17–03.30**
***
**Góður mat- og pizzamatseðil**
***
**Livandi tónleikur hvørt vikuskifti**
***
**Vit hava tvey poolborð**

***Stokkastovan tlf. 448850***



# Royna at finna loysn

*Men tað er upp til semingsmenninar at kalla partarnar saman aftur*

JAN MÜLLER

Hóast hann ikki sleppur til arbeiðis í Fíggjarmálastýrinum á Argjum, so er hann kortini til arbeiðis, fíggjarmálaráðharrin

-Eg ætli mær ikki at liggja á tí latu síðuni, og tí eru eg og onnur við mær eru til arbeiðis, hóast arbeiðsplássið er blokerað. Tað er nógv vit kunnu gera uttan at vera í Fíggjarmálastýrinum sigur Karsten Hansen, sum vísir á, at líka síðani verkfallið byrjaði hevur man roynt at finna eina loysn.

-Fyrr ella seinni verður ein semja, og hon kann einsvæl vera fyrr enn seinni, og tað skal ikki verða nakað dulsmál, at vit arbeiða fram ímóti at finna eina semju.

Karsten Hansen er ikki ósamdur við løgmann, sum í Sosialinum í dag sigur, at her kann kortini blíva talan um ein drúgvan arbeiðsstøð, nú báðir partar søgdu nei til semingsuppskotið. - Men eg trúgvi framvegis uppá, at vit finna eina semju. Og fyri mína skuld kann hon einsvæl vera nú sum um eina viku.

Men fyrsta fyritreytin er so tann, at partarnir kunnu tosa saman.

*-Men onkur má geva seg fyri at koma til eina semju?*

-Tað er rætt, men tað má nú vera upp til semingsmenninar, hvat skal henda. Sjálvandi kunnu partarnir halda fram við at spæla fornermaðir, men tað tænir ongum endamáli.

Karsten Hansen heldur annars, at tølini, sum koma fram frá hinum partinum í miðlunum, eru burturvið og vísir á, at semingsuppskotið samanlagt gevur 3,5% um árið. -Tú fær so ongantíð tað fulla talið fyrsta árið leggur hann aftrat.

Karsten Hansen vísir annars á, at blokadan av Fíggjarmálastýrinum er ólóglig. -Tað er ólógligt at forða fólki í lógliguum ørindum at fara til arbeiðis.

Fíggjarmálaráðharrin hevur tó ongar ætlanir um at senda løgregluna eftir blokadufólkunum.

*-Tað hevur annars ljóðað, at tú skal hava sagt, at verða krøvini hjá Starvsmannafelagnum gingin á møti, so leggur tú frá tær sum fíggjarmálaráðharri?*

-Tað er ikki mín persón hetta málið snýr seg um. Nú er verkfall, og tað er hesum loysast skal upp fyri. Um eg pakki saman loysir einki verkfall. Eg havi fingið eina uppgávu at røkja og ætli mær eisini at gera tað, sum eg haldi er rætt sigur Karsten Hansen.

